## Heilsurøktarar prógv í Vodskov

Tann 26. juni fingu Margret V. Joensen, Vágur, Jónfríð O. Venned Tórshavn og Hanna Einarson Nielsen, Saltangará prógv sum heilsurøktarar á skúlanum í Hammer Bakker í Vodskov í Danmark.



## Ilt við at benda Gøtutrónd

Nú Tróndardagar hava verið í Gøtu, og reist er standmynd av »fyrsta intellekutella føroyinginum«, sum løgmaður málbar seg, so kundi verið hóskandi við eini lítlari rættleiðing, nú so nógv fólk í miðlunum hava bent navnið »Tróndur« skeivt. Tróndur bendist: Tróndur, Trónd, Tróndi, Tróndar. Tað eitur ongantíð »Trónda« í hvønnfalli, sum fleiri ferðir hevur verið at hoyrt. »Vit hava heiðrað Trónd!« (uttan a í endanum). Tann, ið ivast í, hvussu nøvn bendast, kann altíð leita sær á frálíku heiamsíðuna hjá Føroysku Málnevndini, www.fmn.fo, har øll nøvn og allar bendingar síggjast.



# Almennir stovnar seljast at fíggja Sandoyartunnilin

**- Tað kann koma upp á tal, at samgongan fer at einskilja almennar stovnar og brúka ein part av inntøkunum at fíggja Sandoyartunnilin við**

UNDIRSJÓVARTUNLAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Skal Samgongan einskilja almennar ognir og brúka eina part av avkastinum til at fíggja Sandoyartunnilin fyri?

Tað er ein av teimum nógvu spurningunum, sum eru umrøddir í samgonguni, nú roynt verður at finna eina loysn fyri, hvussu ætlanin um at gera undirsjóvartunnil í Eysturoy og í Sandoy, kunnu setast í verk.

Í sambandi við ætlanirnar hevur tað serstakliga verið fíggingarspurningurin, sum hevur verið tórførur at finna semju um.

Ikki minst er tað tórført at semjast um at fíggja Sandoyartunnilin, tí hann er dýrur. Hinvegin fer Eysturoyartunnilin at gera stórt avkast.



*- Ein møguleiki er at einskilja almennar ogning og brúka inntøkurnar av tí at fíggja Sandoyartunnilin við, sigur Heidi Petersen, sum umboðaði Tjóðveldi í tunnilsbólkinum hjá samgonguni*

Heidi Petersen, sum hevur umboðað Tjóðveldið í tunnilsbólkinum hjá samgonguni, sigur, at ein spurningur, sum hevur verið umrøddur, er at einskilja almennar ognir og at brúka ein part av inntøkunum til at fíggja almennar útbyggingar fyri, eitt nú Sandoyartunnilin.

Hon leggur tó dent á, enn ongin niðurstøða er tikin í hesum sambandi.

Men hon vísir á, at tað almenna eigur stórar ognir, eitt nú Føroya Tele, tveir triðingar í Atlantsflogi, Húsalánsgrunnin, Realin og aðrar ognir og aðrir grunnar.

- Hetta eru alt ognir, sum høvdu kastað nógva pening av sær til landskassan, verða tær einskildar og ein partur av teimum kundi verðið brúktur at fíggja Sandoyartunnilin og aðrar útbyggingar við, sigur løgtingskvinnan hjá Tjóðveldinum.

- Tað hevði avmarkað upphæddina, sum tað er neyðugt at læna til Sandoyartunnilin, leggur hon afturat

### Mugu hugsa um búskapin

Annars sigur hon, at tilmælið í tunnilsbólkinum sigur heilt greitt, at endamálið hjá samgonguni er at fara undir Sandoyartunnilin í 2011.

Men eisini hon heldur at tað er blóðskeivt av samgonguni at binda seg til ein ávísan dag, tí tað veldst alt um búskaparligu støðuna.

Hon vísir hon eisini á, at samgongan vil ikki fara undir tunnilin, fyrrenn 150 milliónir krónur standa í partafelagnum, sum skal gera tunnilin.

Og endamálið er, at tað skal vera í 2011

- Hinvegin sleppa vit ikki undan alla tíðina at taka støði í búskaparligu støðuni og tí er tað ómøguligt at siga beint nú, nær fíggjarligar vánir vera fyri at fara undir Sandoyartunnilin, sigur Heidi Petersen.

- Vit vænta ikki, at nøkur onnur samgonga hevur so stóran vilja at fremja Sandoyartunnilin, sum hendan, men verður ov stór afturgongd í samfelagnum, er tað ómøguligt at byrja longu í 2011 og tí ber rætt og slætt ikki at geva sandoyartingmonnum nakra ávísa dagseting.

- Tað er tað stór semja um í samgonguni.

- Hinvegin verður beinanvegin farið undir at fyrireika tunnilin, so tað er klárt at byrja, tá ið fíggingin er klár.

Annars staðfestir Heidi Petersen, at tað kemur undir ongum umstøðum upp á tal at gera bæði Eysturoyartunnilin og Sandoyartunnilin ísenn.

*Hvør skal so gerast fyrst?*

- Tað veit eg ikki, tað kundi verið tann, sum er longst frammi í fyrireikingunum, sigur hon og so má hin bíða í eini fýra, ella fimm ár.

Her kann leggjast afturat, at tað er Eysturoyartunnilin, sum er komin nógv longri í fyrireikingunum, tí verður skjótt atborið er klárt at bora har um eitt ár.

# Tórshavnar Skipasmiðja hevði besta tilboðið



*Tórshavnar Skipasmiðja hevur nú fingið litið upp í hendurnar at projektera nýtt havrannsóknarskip og stjórin á Fiskirannsóknarstovuni vónar, at tað eydnast teimum at fáa nýtt havrannsóknarskip*

**Tað er nú avgjørt, at tað verður Tórshavnar Skipasmiðja, sum skal projektera nýggja havrannsóknarskipið, sum samgongan ætlar at byggja**

HAVRANNSÓNARSKIP
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað verður Tórshavnar Skipasmiðja, sum fær litið upp í hendurnar at projektera nýggja havrannsóknarskipið.

Tað er avgjørt nú um dagarnar.

Tá ið fíggjarlógin fyri í ár varð samtykt, vórðu 2,9 milliónir settar til at projektera eitt nýtt havrannsóknarskip, sum samgongan hevur sett sær fyri at byggja.

Síðani hevur projektið verið boðið út og tá ið avtornaði komu fimm tilboð inn, tvey úr Føroyum og annars eitt úr Danmark og tvey úr Noregi.

Og nú er so avgerð tikin um, at samanumtikið var tað Tórshavnar Skipasmiðja, sum hevði tað besta tilboðið.

- Tórshavnar Skipasmiðja hevði tað tilboðið, okkum dámdi best, samanumtikið, sigur Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni við Portalin.

Í projekteringini bindur Tórshavnar Skipasmiðja seg til at taka serkønar ráðgevarar uttanlands upp í, har tað er neyðugt,

Men hann vil ikki upplýsa prísin, tí skulu fleiri samráðingar vera við Skipasmiðjuna um endaliga prísin.

Eitt, sum dentur varð lagdur á, var, at projekterandi skipasmiðjan er tætt við.

Hjalti í Jákupsstovu sigur, at projektið skal vera liðugt í ár og verður peningur játtaður á fíggjarlógini, verður arbeiðið boðið út beinanvegin.

Nýggja skipið verður eitt sindur størri enn Magnus Heinason, sum annars hevur tænt teimum væl, men tíðin er farin frá honum, tí hvørki tekniskt, ella í aðrar mátar, lýkur hann dagsins krøv.

Hjalti í Jákupsstovu dylir ikki fyri, at tey vóna at tað eydnast at fáa skipið, tí tað verður eitt stórt framstig og hetta verður so fyrstu ferð, at vit fáa eitt havrannsóknarskip, sum er smíðað til endamálið.